tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 04.01.2021 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir: Jónhild Midjord Nybo, tekur sætið at viðgerða mál 20/00416-2 «Umsókn frá borgarstjóranum» og val av nevndarlimi í Skattakærunevndina.

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

Viðmerking; Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest rýmdi av fundinum kl. 19:40.

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 1/21 | 20/00416-2 | Umsókn frá borgarstjóranum samb. §6, stk. 2, 5. pkt. í Kommunsustýrislógini |
| 2/21 | 21/00001-2 | Dagføringar av Kommunustýrisskipani fyri Tvøroyrar kommunu |
| 3/21 | 20/00364-1 | Val av nevndarlimum -aðrar nevndir §30-34 samb. Kommunustýrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu |
| 4/21 | 20/00418-2 | Tilnevning av dátuverndarfólki |
| **Til kunningar** | | |
| 1/21 | 20/00203-2 | Samanbering av skatti 2019/2020 |
| | | |

Til støðutakan

**1/21**
**20/00416-2 Umsókn frá borgarstjóranum samb. §6, stk. 2, 5. pkt. í Kommunsustýrislógini**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 04.01.2021 | 1/21 |

**Frágreiðing til málið:**
**Kommunustjórin 30.12.2020**
Kristin Michelsen, borgarstjóri hevur hin 29.12.2020 latið kommunustjóranum bræv, við umsókn um at loyvið at halda fram sum borgarstjóri fulla tíð, og samstundis hava sæti á løgtingi.

Í sama brævi verður heitt á kommunustjóran um at innkallað 1. valda tiltakslimur á Felagslistanum, ið er Jónhild Midjord Nýbo um at møta fyri Kristin Michelsen, í hesum málinum.

**Lógargrundarlag:**
***Kommunustýrislógin***

- *§10. Stk. 1. Kommunustýrislimur hevur skyldu at boða frá, um hann heldur iva vera um sítt gegni.*
- *Stk. 2. Kommunustýrið ger av, um ein kommunustýrislimur er ógegnigur.*
- *Stk. 3. Er líkt til, at kommunustýrið tekur avgerð um, at kommunustýrislimur er ógegnigur, kunnu limir, ið eru valdir á viðkomandi valevnislista, krevja, at tiltakslimur fær fundarboð.*

- *§6. Stk. 2. Val av borgarstjóra hevur gildi alt valskeiðið. Borgarstjórin verður valdur millum kommunustýrislimirnar eftir meirilutavalháttinum sambært § 2. Setanarbrøkur borgarstjórans verður ásettur í kommunustýrisskipanini til antin ½ ella 1/1. Um setanarbrøkurin er 1/1, skal borgarstjórin, tá ið hann er valdur, leggja borgarliga starvið frá sær umframt øll almenn álitisstørv, sum ikki beinleiðis hava samband við starvið sum borgarstjóri. Kommunustýrið kann loyva frávik frá regluni í 4. pkt, tá ið umrøður størv sum eru beinleiðis fólkavald.*

**Tilmæli:**

- Loyva Jónhild Midjord Nybo at taka sæti í býráðnum.
- Loyva Kristin Michelsen at halda fram sum borgarstjóri og samstundis hava sæti í løgtinginum.

**Býráðið 04. januar 2021:**
Einmælt samtykt, at Jónhild Midjord Nybo tekur sætið í býráðnum fyri Kristin Michelsen í hesum málinum. Atkvøtt var um hvørt Kristin Michelsen heldur fram sum borgarstjóri samstundis sum hann er løgtingslimur: Fyri eru Anita Vibergsdóttir, Jónhild Midjord Nybo, Alvi Mortensen og Jónleyg J. Bech. Ímóti eru Bjarni Hammer, Súsanna Bertholdsen, Kristina Roest. Málið er harvið samtykt.
Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at Tvøroyrar kommuna er ein stór kommuna, og hevur brúk fyri at borgarstjórin virkar sum borgarstjóri 100%.

**2/21**
**21/00001-2 Dagføringar av Kommunustýrisskipani fyri Tvøroyrar kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 04.01.2021 | 2/21 |

**Málslýsing:**
**Kommunustjórin 01.01.2021**
Tvær greinar í kommunustýrisskipanin fyri Tvøroyrar kommunu, skulu dagførast.

**6. partur (Aðrar nevndir)**
Tvøroyrar býráð hevur einmælt samtykt við 2 viðgerðum, seinast hin 29.04.2020, at Fámjins kommuna verður partur av felags tilbúgvingini, saman við Hvalbiar kommunu og Tvøroyrar kommunu, og at Fámjins kommuna velur ein umboðandi lim í Tilbúgvingarnevndina, sum harvið verður viðkað frá 7 limum til 8 limur.

- *§32. Tilbúgvingarnevndin (verandi)*
    - *1. Petti. Tilbúgvingarnevndin hevur 7 limir. Í tilbúgvingarnevndini sita 3 limir, tilnevndir av Tvøroyrar Býráð og 1 limur, tilnevndur av Hvalbiar Bygdaráð.Tilbúgvingarleiðarin á Tvøroyri, sýslumaðurin og ein limur umboðandi Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag (SNB) eru eisini limir í tilbúgvingarnevndini. Borgarstjórin á Tvøroyri er føddur formaður í tilbúgvingarnevndini. Harumframt velur Tvøroyrar Býráð 3 varalimir í tilbúgvingarnevndina.*

- *§32. Tilbúgvingarnevndin* ***(broytt)***
    - *1. Petti. Tilbúgvingarnevndin hevur 8 limir. Í tilbúgvingarnevndini sita 3 limir, tilnevndir av Tvøroyrar Býráð og 1 limur, tilnevndur av Hvalbiar Bygdaráð og ein limur tilnevndur av Fámjins Bygdaráð. Tilbúgvingarleiðarin á Tvøroyri, sýslumaðurin og ein limur umboðandi Suðuroyar Norðara Bjargingarfelag (SNB) eru eisini limir í tilbúgvingarnevndini. Borgarstjórin á Tvøroyri er føddur formaður í tilbúgvingarnevndini. Harumframt velur Tvøroyrar Býráð 3 varalimir í tilbúgvingarnevndina.*

Snaran -Tvøroyrar býráð hevur hin 14.06.2018 einmælt samtykt at avtaka sjálsognarstovnin Snaran, og ístaðin yvirtekur Tvøroyrar kommuna ognarskapin aftur av Snaruni og skipar virksemið í Snaruni.

- *§34 Aðrar nevndir, Snaran: (verandi)*
    - *Tvøroyrar býráð velur 2 limir og 2 varalimir*
- *§34, Aðrar nevndir, Snaran* ***(broytt)***
    - *Henda nevnd er avtikin*

**Tilmæli:**
Kommunustýrsiskipan fyri Tvøroyrar kommunu verður broytt samb. omanfyri nevndu samtyktir.

**Býráðið 04. januar 2021:**
Einmælt samtykt at broyta kommunustýrisskipanina.

**3/21**
**20/00364-1 Val av nevndarlimum -aðrar nevndir §30-34 samb. Kommunustýrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 04.01.2021 | 3/21 |

Tilmæli: Samb. Kommunustýrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu 6. Partur "Aðrar nevndir" skulu veljast nevndarlimir í: *-limir vera valdir við lutfallsvalið-*

- §30 Skattakærunevndina fyri Suðuroynna, 2 limir og 2 varalimir
- §31 Barnaverndarnevndina, 1 limur og 1 varalimur
- §32 Tilbúgvingarnevndin, borgarstjórin er føddur form. og vera fyri uttan borgarstjóran valdir 2 limir og 3 varalimir.
- §33 Ferðslunevndin –somu limir sum í teknisku nevnd, umframt 1 umboð fyri løgregluna og 1 varaumboð fyri løgregluna, 1 umboð fyri koyrilærarnar og 1 varaumboð fyri koyrilærarnar.
- §34 Stk.1 Skúlastýrið, 2 limir og 2 varalimir
  - Stk.2 Kommunufelagið Borgarstjórin er føddur limur
  - Stk.3 Suðuroyar ferðavinnufelag, 1 limur og 1 varalimur
  - Stk.4 Valnevndin, 5 limir og 5 varalimir
  - Stk.5 Musikkskúlin fyri Suðuroy, 1 limur og 1 varalimur
  - Stk.6 Snaran, 2 limir og 2 varalimir
  - Stk.7 Tvøroyrar Bygda- og sjóvinusavn 1 limur og 1 varalimur
  - Stk.8 Umboð í IRF, 1 limur og 1 varalimur
  - Stk.9 Umboð í SEV, 1 limur og 1 varalimur
  - Stk.10 Suðuroyar Ellis- og Røktarheim, 1 limur og 1 varalimur
  - Stk.11 Suðuroyar Bú- og Heimatænastu, Borgarstjórin er føddur limur, og umframt verður valdur 1 limur og 1 varalimur

**Skipan av valbólkum:**

- **Valbólkur A**: Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen
- **Valbólkur B:** Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg J. Bech

**Býráðið 04. januar 2021:**

**Suðuroyar Ellis og Røktarheim:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Kristin Michelsen, og varalimur Anita Vibergsdóttur
  Einmælt samtykt

**Suðuroyar Musikskúli:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Pól Arni Holm, og varalimur Anita Vibergsdóttur
  Uppskot frá valbólki A: Til fast lim Eyðun Nólsøe, og varalim Póla Arna Holm
  Fyri uppskot A: Bjarni Hammer, Súsanna Bertholdsen, Kristina Roest
  Ímóti uppskoti A: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen og Jónleyg J. Bech.
  Harvið er uppskot A fallið.
  Uppskot frá valbólki B: Einmælt samtykt

**Tvøroyrar Bygda og Sjósavn:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Kári Jespersen, og varalimur Chris Jan Michelsen
  Einmælt samtykt

**Skattakærunevndin:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Óluva K. Mortensen, varalimur Eyðbjørg Midjord og fastan lim Frígerð Mortensen, og varalimur Hanna Nielsen
  Alvi Mortensen trekkir seg í hesum málinum vegna gegni, og Jónhild M. Nybo tekur sætið.
  Uppskot frá valbólki A: Sum fastan lim Jens Johannesen og vara limur Hallur í Heiðunum
  Fyri uppskot A: Bjarni Hammer, Súsnna Bertholdsen, Kristina Roest
  Ímóti uppskoti A: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónhild Midjord Nybo og Jónleyg J. Bech. Harvið er uppskot A fallið.
  Uppskot frá valbólki B: Einmælt samtykt

**Barnaverndartænastan: (Stýrið)**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Jónleyg J. Bech, og varalimur Anita Vibergsdóttu
  Einmælt samtykt

**Barnaverndin:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er [redacted], og varalimur [redacted]
  Einmælt samtykt

**Suðuroyar Bú og Heimatæansta:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Kristinn Michelsen føddur limur, varalimur Anita Vibergsdóttur, og fastan lim Jónleyg J. Bech, varalimur Anita Vibergsdóttur
  Uppskot frá valbólki A: Sum fastan lim Súsanna Bertholdsen og varalimur Kristina Roest
  Fyri uppskot A: Bjarni Hammer, Súsanna Bertholdsen, Kristina Roest
  Ímóti uppskoti A: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen og Jónleyg J. Bech.
  Harvið er uppskot A fallið.
  Uppskot frá valbólki B: Fyri eru Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen og Jónleyg J. Bech, harvið er uppskot B samtykt.

**Skúlastýrið:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Alvi Mortensen, og varalimur Anita Vibergsdóttur
- Uppskot frá valbólki A: Sum fastan lim Bjarna Hammer og varalimur Súsanna Bertholdsen
  Einmælt samtykt

**Skjalasavnið:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Anita Vibergsdóttur, og varalimur Jónleyg J. Bech
  Einmælt samtykt

Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest valdi at fara av fundinum, kl. 19:40.

**Føroya Eftirskúli:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Kristin Michelsen, og varalimur Anita Vibergsdóttur
  Til fastan lim er Rasmus Rasmussen, og varalimur Ólavur Rasmussen
  Til fastan lim er Jónhild Nybo, og varalimur Mina Joensen
  Uppskot frá Kristin Michelsen var at útseta hetta mál. Fyri at flyta málið til ein seinni fund er einmælt samtykt

**IRF:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Anita Vibergsdóttur, varalimur Kristin Michelsen
  Einmælt samtykt

**SEV:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Alvi Mortensen, og varalimur Anita Vibergsdóttur
  Einmælt samtykt

**Valnevnd:** Uppskot frá valbólki B:

- Jean Dimon, varalimur Otto Gram
- Mariann Mikkjalsdóttur, varalimur Mina Joensen
- Armgarð Sørensen, varalimur Ronald Robertsson

Uppskot frá valbólki A: Sum fastan lim Jonhild Andreasen og varalimur Malla Dam, og Diana Heinesen varalimur Annika Eidesgaard.

Einmælt samtykt

**Brunanevndin:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Kristin Michelsen, og varalimur Anita Vibergsdóttur
  Fastan lim Alvi Mortensen, varalimur Jónleyg J. Bech
- Uppskot frá valbólki A: Til fastan lim er Bjarni Hammer fastur limur og vara limur Súsanna Bertholdsen
- Átaksleiðarin Annfinn Hammerfoss Leo, varalimur Jón Einarsson
- Hvalbiar kommuna, fastan lim umframt varalim
- Fámjins kommuna fastan lim umframt varalim
- Suðuroyar norðara Bjargingarfelag fastan lim umframt varalim
- Sýslumaðurin í Suðri.
  Einmælt samtykt

**Ferðslunevndin:**

- Uppskot frá valbólki B: Til fastan lim er Alvi Mortensen, varalimur Jónleyg J. Bech, og fastan lim Anita Vibergsdóttur, varalimur Jónleyg J. Bech
- Uppskot frá valbólkin A: Til fastan lim er Kristina Roest og varalimur er Bjarni Hammer
- Politiið í Suðri
- Umboð fyri koyrilærarnar Alvi Mortensen, varalimur Áki Dimon.
  Einmælt samtykt

## 4/21
## 20/00418-2 Tilnevning av dátuverndarfólki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 04.01.2021 | 4/21 |

**Málslýsing:**

**Kommunustjórin 30.12.2020**

Í samband við at nýggj dátuverndarlóg kemur í gildi nú 1. januar 2021, er ein av grundleggjandi broytingum í nýggju lógini er, at allir almennir myndugleikar og stovnar skulu tilnevna eitt dátuverndarfólk, sum hevur til uppgávu at ráðgeva í spurningum um dátuvernd.

Dátuverndarfólkið skal hoyrast í øllum málum, sum eru viðkomandi fyri dátuverndina innan kommunala myndugleikan. Dátuverndarfólkið skal verða við til at tryggja, at kommunan heldur dátuvernarlógina. Fyrstu tíðina kemur viðkomandi tí eisini at hava stóran týdning fyri, hvussu kommunurnar koma at tillaga seg og implementera nýggju broytingarnar í dátuverndarlógini.

**Tilmæli:**

**Tilnevnan av Dátuverndarfólkið.**

Mælt verður til at Lasse Jensen verður tilnevndur dátuverndarfólk fyri Tvøroyrar kommunu.

**Býráðið 04. januar 2021:**

Einmælt samtykt

**Til kunningar**

## 1/21
## 20/00203-2 Samanbering av skatti 2019/2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 04.01.2021 | 1/21 |

**Býráðið 04. januar 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 20:15

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen

Jónhild Nybo
Jónhild Midjord Nybo